FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-078_2.1
dags. 24-02-2010

Innlendismálaráðið
Att.: Kaj Johannesen

Teldupostur: imr imr.fo

Viðv.: Tygara 7005-007/08, uppskot til løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð

Felagið móttók omanfyrinevnda uppskot til hoyringar 19. februar við freist at lata inn viðmerkingar 24. februar. Felagið hevur givið kommununum, har tunnelin er aktuel, møguleika at viðmerkja uppskotið.

Kommunurnar fegnast um at lógaruppskotið nú er gjørt, og hava hesar viðmerkingar til lógartekstin:

§ 9, stk. 1 (2): Her verður heimilað loyvishavaranum frítt at áseta brúksprísin. Vit skilja, at hetta kann vera neyðugt, t.d. fyri at felagið kann fáa optimala fígging o.a. Tað kann tó vera ein vandi fyri brúkaran, um felagið t.d. freistast til at áseta prísin eftir maksimalari inntøku heldur enn einans eftir tí, sum er neyðugt fyri at tryggja eigarunum sítt vinningsbýti og at gjalda neyðug avdrøg og rentur fyri lán, t.d. til at niðurgjalda lán skjótari enn ásett í lánitreytunum, sum møguliga kann vera ein fyrimunur fyri eigaran, meðan tað samstundis er ein vansi fyri brúkaran tey fyrstu árini. Tí vil Nes Kommuna heita á Innlendismálaráðið um at innbyggja onkra mekanismu í loyvistreytirnar, sum tryggjar ein so javnan prísprofil gjøgnum loyvistíðina, sum gjørligt.

<u>§ 13 (og aðrastaðir)</u>: Nes kommuna vil gera vart við, at økið á eystara armi vestan fyri Løkin, har tunnilsportalurin eftir ætlan kemur at verða, er í Nes kommunu, og harvið ikki "í Runavík", men "við Runavík". Hetta fyri góðan ordan skuld, við tað at hetta onganstaðni framgongur í lógartekstinum.

Kap. 2. Almennar viðmerkingar - Avleiðingar av uppskotinum

Umframt tær nevndu avleiðingarnar vildi tað verið natúrligt at nevnt m.a.:

a. Undir verandi pkt. 1. *"Fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur"*: Við tunlinum verður minni trýst á verandi vegakervi, so minni útreiðslur verða til viðlíkahald v.m. Hesi viðurskifti kundu eisini verði nevnd í talvuni (pkt. 11).

b. "*Fíggjarligar avleiðingar fyri brúkaran*" – sum eru sera jaligar. Hetta kann t.d. nevnast í einum serstøkum broti, men eisini undir verandi pkt. 7 (sum nevnir

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

jaligar avleiðingar fyri vinnuna, men nevnir ikki tað sama fyri brúkaran), og í talvuni (verandi pkt. 11).

c. Undir verandi pkt. 4. "*Avleiðingar fyri umhvørvið*" manglar at verða nevnt, at tunnilin fer at føra við sær eina minking í samlaðum koyrdum kilometrum, hóast fleiri bilar væntast at fara at koyra gjøgnum tunnilin enn eftir vegunum í dag. Hetta fer at merkja eina samsvarandi minking í skaðiligum útláti frá bilferðsluni (CO_2 o.a.m.).

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Tað tykist sumstaðni at vera ósamsvar millum lógartekstin og viðmerkingarnar, t.d.:

- § 2, stk. 3 (seinasta reglubrot);
- § 6, stk. 6.

fyri felagið

Sveiney Sverrisdóttir, skr.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo